LM-067/2022

Fylgiskjal 3

SUÐUROYAR SÝSLA

Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

Dagfesting: 3. september 2021
Tygara skrás.nr.: 21/03451-4
Málsviðgeri:-

Sýslumaðurin

Kirkjubrekkan 11
Postboks 13
FO-810 Tvøroyri

Telefon: +298 351448
Telefax: +298 372053

Hoyringssvar í samband við uppskot til løgtingslóg um náttúrufriðing.

Vísandi til teldupost tygara frá 23. juli 2021 skal verða sagt frá, at sýslumaðurin fyri Suðuroyar Sýslu hevur fylgjandi viðmerkingar til lógarupskotini:

Sum nevnt í almennu viðmerkingunum til uppskotið, so hava friðingarheimildirnar í galdandi lóg um náttúrufriðing lítið og einki verið brúktar, og kemur lógaruppskotið, verður tað viðtikið, tí ikki at ávirka arbeiðið hjá lokalu náttúrufriðingarnevndunum stórvegis, annað enn at lógargrundarlagið tá fer at samsvara við galdandi praksis og harvið gerst ruddiligari.

Hvar viðvíkur § 2, stk. 2, í lógaruppskotinum um náttúrufriðingarlóg verður mælt til at umhugsa at gera ásetingina greiðari við at broyta orðingina "eigur" til "skal". Sum nú er, er tað rættiliga tilvildarligt, í hvørjum førum friðingarmyndugleikarnar verða kunnaðir um bygging innangarðs.

Burturbeining av bygningum og útbúnaði, sum ikki longur verður brúkt.
Tað er ein sannroynd, at tað stundum kann vera trupult at fáa burtur bygningar og útbúnað sum ikki longur verða brúkt til uppruna endamálið ella annað rímiligt endamál, og sum náttúrufriðingarmyndugleikarnar upprunaliga hava givið loyvi til. Slíkar leivdir skemma í dag í stóran mun náttúruna. Nevnast kunnu t.d. gamlar vindmyllur, sendimastrar, virkisbygningar og gamal aliútbúnaður, har upprunaligu eigarnir í mongum førum eru farnir av knóranum, ella ikki havi vilja ella fíggjarorku til at burturbeina nevndu byggingar og útbúnað. Tí verður mælt til at umhugsa, hvørt tað hevði verið rætt, og um so verður mett, hvussu almennu Føroyar kunnu tryggja sær, at slíkar leivdir verða burturbeindar tá tær ikki longur verða brúktar til uppruna endamálið, og hvussu sleppast kann undan, at burturbeiningin dregur út í áravís tí ógreitt er, til dømis hvør skal taka stig til og/ella rinda fyri burturbeiningina.

Uppskotið til løgtingslóg um náttúruvernd.
Mælt verður til at umhugsa, hvørt tað ikki hevði verið skilagott at latið landafrøðiliga lokal umboð luttiki í málsviðgerðini av komandi nátturuverndarmálum. Tað er eingin ivi um, at nógvur kunnleiki og vitan um lokal nátturuviðurskifti, umframt lokalar royndir finnast úti í økjunum kring landið, men ikki centralt, har flestu um- og fyrisitingar verða lagdar. Eisini eigur at verða hugsað um, hvussu myndugleikin framyvir ætlar at hava eftirlit við, at avgerðir pg treytir, tiknar og settar centralt, verða fylgdar lokalt.

Vinarliga

Jaspur Vang,
sýslumaður.